FØROYAR MÍTT LAND



# Tá fyrsti bilurin kom til Føroyar

**Tá Janus Mohr heitti á meg um at skriva onkrar snøklar til frálíku sendingina á Rás 2, Føroyar mítt land, og at tað fyrsta skuldi lesast 6. mai – fall hugur mín beinanvegin á evnið, tá fyrsti bilurin kom til Føroyar**

## Bilasøga



**Eirikur Lindenskov**
eirikur@sosialurin.fo

Tí tað var júst tann 6. mai – í 1922 – at fyrsti bilurin kom. Tað vóru teir báðir havnarmenninir, Jóhannes Olsen undir Kletti og Júst Sivertsen, sum keyptu bilin. Tað var ein Ford TT lastvognur, árgang 1922. Hann hevði hús, pláss til tvey fólk í húsinum og last, sum lastaði eitt tons.

Vit hugsa kanska ikki so nógv um tað, men hesin dagurin er í veruleikanum ein sera týdningarmikil dagur. Eitt snúningspunkt í Føroya søgu, kunnu vit siga.

Tað er ilt at meta um, hvussu nógvir bilar eru komnir til landið síðani tá, men teir eru nógvir. Summi okkara hava størri áhuga fyri bilum, enn onnur – og vit eru nøkur, sum eisini hava stóran áhuga fyri gomlum bilum, fyri ellisakførum – men um vit bara hugsa um bilin sum eitt flutningstól, so hevur hann havt – og hevur hann enn – sera stóran týdning fyri okkum øll. Vit høvdu ikki kunna búleikast her, um vit ikki høvdu bilin, vit høvdu ikki kunna flutt okkum, vit høvdu ikki kunna virkað fisk, bygt hús ella nakað, um bilurin ikki var her. Vit høvdu ikki havt tørv á vegum, vit høvdu ikki bygt brýr og tunlar og ferjur og hvat veit eg. Bilurin hevur sera stóran týdning fyri allar lutir í samfelagnum.

Tí haldi eg, at tann 6. mai í 1922 er ein sera týdningarmikil dagur í Føroya søgu. Og tað undrar meg, at eingin søguskrivari hevur givið ans.

Vit hava professarar, sum skriva bøkur upp og niður um fisk, um ull, um torv – og tonk allar bøkurnar um skip, um skiparar, um krígssiglarar, um útróðrarmenn í Grønlandi og hvat veit eg. Men eingin hevur skrivað um bilin – uttan ein bilmekanikari, sum arbeiðir á Sosialinum, Magnus Gunnarson, sum hevur skrivað 50 ára jubileumsbókina hjá bilstøðini Auto í Havn. Tað er higartil einasta bila-ískoyti í Føroya søgu.

Kanska bilavinnan í Føroyum skuldi tikið seg saman og á onkran hátt gjørt 6. mai til ein merkisdag – til eina serliga bilaframsýning, søluframsýning, what ever. Nógvir eru hættirnir at selja, hví ikki eisini brúka 6. mai til tað?

Men latið okkum nú fara 86 ár aftur í tíðina:

Tað vóru teir báðir samstarvsfelagarnir Wenzel Petersen og Vilhelm Nielsen, sum seldu bilin. Teir høvdu smiðju saman í Quillingsgarði. Tað er í Erlings Jalsgøtu – beint yvir av gomlu Dimmalætting.

Tað eru valla nógv fólk í dag, ið hava upplivað henda minniliga dagin í 1922 – og sum kunnu greiða frá. Eg havi tó kortini eina fyrsta honds keldu, tí Oluffa Jensen, Luffa í Gongini, hevur einaferð greitt mær so gjølla frá hesum. Hon mintist sera væl hendan dagin, tí Jóhannes Olsen var systkinabarn hennara – og vaks upp í heiminum hjá teimum undir Kletti í Havn. Hendan dagin hevur Luffa verið 10 ára gomul, og hon doyði í 2000, 88 ára gomul.

Júst Sivertsen er gitin um alt landið sum tann fyrsti føroyingur, ið fekk bil. At hann hevði eitt virki við nógvum lastbilum – sum Sjúrður, sonurin og abbasynir havi rikið víðari, hevur helst styrkt um hesa fatana.

Men Johannes Olsen, sum kortini var tann fyrsti, ið koyrdi bil, og sum hevur fingið koyrikort nummar eitt í Føroyum, hevur eftirtíðin hoyrt minni um. Men tað av góðum grundum. Hann gjørdi ikki so nógv um seg, tí hann fall so skjótt frá – hann doyði av vanlukku, tá ein ketil sprongdist á nýggja Alexandrines Hospital í 1924.

Men latið okkum fara oman aftur á Kongabrúnna hendan 6. mai í 1922. Luffa greiðir frá, at nógv fólk varð komið saman,

## Tey fyrstu koyrikortini:

| Nr. Navn | føddur | kort dagfest |
|---|---|---|
| 1. Johannes Olsen | 1894 | 23. august í 1923 |
| 2. Júst Sivertsen | 1892 | 23. august í 1923 |
| 3. Aksel Dalsgaard, Skálavík | 1901 | 25. september í 1923 |
| 4. Jacob Henrik Isaksen, Søldarfirði | 1879 | 23. oktober 1923 |
| 5. Hans Georg Hansen, Miðvági | 1893 | 25. oktober í 1923 |
| 6. Gregorius Hansen, miljonerurin, Tórshavn | 1892 | 10. januar í 1924 |
| 7. Carl O. Jensen, stjóri á Meiarínum, Havn | 1892 | 10. jaunar í 1924 |
| 8. Johan Eli S. Mikkelsen, Havn | 1899 | 10. januar í 1924 |
| 9. Christian Frederik Jensen, Havn | 1887 | 20. februar í 1924 |
| 10. Johan Karl Poulsen, Havn | 1882 | 5. mars í 1924 |
| **Fyrsta kvinnan:** | | |
| 27. Petra Elisa Frida Rein í Havn | 1907 | 17. august í 1926 |

*(Kelda: Meinhardt Arge, tíðarritið Ellisakfør apríl 1993)*

Sosialurin